

*Bretski oljumálaráðharrin Helen Lidell her saman við norska starvsbróðurinum, Olav Akselsen stutt eftir at tey høvdu havt samrøður við føroyska oljumálaráðharran Eyðun Elltør* **Mynd jan**

*Bretski oljumálaráðharrin:*

# Føroysk oljuleiting týdning fyri bretar

*Nú komandi útbjóðingin á bretskum øki longu er vorðin útsett í eina tíð og helst verður tað nakað enn kemur tað væl við hjá bretskum myndugleikum og ídnaðinum, at føroyingar nú hava sett hol á sína fyrstu útbjóðing. Bretski oljumálaráðharrin heldur, at hetta kann hava stóran týdning fyri bretar eisini*

Jan Müller
Stavanger

Millum mongu gestirnar á altjóða oljuframsýningini í Stavanger vóru eisini einstakir ráðharrar, sum hava stóran áhuga fyri gongdini í Føroyum, nú tey fyrstu oljuloyvini eru latin oljufeløgum.

Sosialurin hitti nýggja bretska kvinnuliga orku- og oljumálaráðharran, Margareth Lidell eftir fundin hon hevði við føroyska starvsbróðurin, Eyðun Elttør. Tað var eftir ynski frá bretum, at hesin fundurin kom í lag. Tað var annars ein fundur millum táverandi oljumálaráðharran í Bretlandi og Eyðun Elttør á júst sama stað á ONS í Stavanger, sum fekk gongd á aftur samráðingarnar millum føroyingar og bretar um markið.

Hesaferð var fundurin tí meira á vinarligum og samstarvsligum støði. Eyðun Elttør sigur seg vera sera væl nøgdan við fundin, sum hann kallar eina roynd at byggja brýr millum Føroyar og Bretland á oljuøkinum. -Nú vit ikki longur skulu brúka tíðina uppá at loysa eina marknatrætu, fáa vit betri tosað um felags áhugamál og ítøkiligt samstarv.




*Eyðun Elttør, oljumálaráðharri og Kjartan Kristiansen, á føroyska básinum* **Mynd jan**

Eyðun Elttør sigur við Sosialin, at tað er greitt, at bretar vilja hava samvinnu við føroyingar, tí hetta kann hava týdning fyri bretska oljuídnaðin, sum ikki hevur fingið nóg nógv arbeiði burtur úr oljuvirkseminum




*Hesi ungfólkini syrgdu fyri at veita útlenskum vitjandi alla ta hjálp sum hugsast kann. Føroyar hava vissuliga eina presentabla móttøku, tá ræður um at marknaðarføra Føroyar. Mynd jan. Básurin, sum eisini tók seg sera væl út, hava tey hjá Team 85 staðið fyri. Eitt gott arbeiði er gjørt har.*

*Norski oljumálaráðharrin:*

# Statoil er eitt gott val hjá føroyingum

*– bert spell, at hitt norska oljufelagið ikki megnaði at fáa loyvi*

Jan Müller
Stavanger

Eisini norski oljumálaráðharrin nýtti høvi at vísa føroyingum ans á oljuráðstevnuni í Stavanger. Saman við forsætisráðharranum Jens Stoltenberg og norska konginum vitjaði hann føroyska básin, tá framsýningin lat upp týsdagin. Olaf Akselsen nýtti eisini høvi her at heilsa uppá føroyska starvsbróðurin.

Akselsen, sum tók við starvinum herfyri, sigur við Sosialin, at hann er fegin um, at føroyingar valdu Statoil sum eitt av feløgunum til at leita eftir olju og gassi á landgrunninum. Hann sigur seg vóna, at bæði Statoil og onnur oljufeløg, sum fara at virka í Føroyum, fara at brúka norska teknologi, tá tey skulu gera sínar kanningar.

– Eg hevði ein sera positivan fund við Eyðun Elttør og har segði eg honum, at við teimum 35 ára royndunum, sum vit í Noregi hava á oljuøkinum, so eru vit sera áhugaðir í samstarvi og vilja bjóða fram ta hjálp, sum føroyingar hava brúk fyri.

Olaf Akselsen vónar, at tað verða funnar stórar goymslur við bæði olju og gassi á føroyska landgrunninum.

Spurdur um hann ikki er vónsvikin av, at hitt norska hálvalmenna oljufelagið Norsk Hydro ikki fekk leitiloyvi sigur Akselsen, at tað er spell, at tað ikki hevur klárað seg í kappingini. -Ég havi ikki nóg nógvan kunnleika til, hví tað gekk sum tað gjørdi, men eg kann so bert vera fegin um, at tað eydnaðist øðrum av norsku oljufeløgunum at vera við.

Hvat viðvíkur vónunum at finna olju við Føroyar, so heldur norski oljumálaráðharrin tað vera rættiliga sannlíkt, at olja er til steðar, nú stór fund eru gjørd so stutt frá markinum.

Norski oljumálaráðharrin hevur ongar ætlanir at vitja í Føroyum í næstum, men tað hevði kunnað verið áhugavert at vitjað norrønu ættfrændir sínar.



# Føroyskt oljufelag ikki avgerandi fyri loyvisgevingina

Jan Müller
Stavanger

Millum føroyingarnar á oljuráðstevnuni í Stavanger var eisini stjórin í Oljumálastýrinum, Herálvur Joensen. Tá Sosialurin fekk orð á hann helt hann tað vera gott, at føroyskur ídnaður og fyritøkur gera so stórt arbeiði fyri at fáa føroyskt innihald í komandi oljuleiting. Tað var eisini nettupp fyri at ganga hesum á møti, at Oljumálastýrið og fólkini har gjørdu sær so stóran ómak fyri at hava útbjóðingina klára áðrenn ONS. M.a. hevur Menningarstjórin, sum hevur lagt luttøkuna á ONS til rættis, lagt stóran dent á júst hetta, at loyvini kundu verða latin, áðrenn føroyingar fóru á oljumessu.

Annars heldur stjórin í Oljumálastýrinum tað vera eitt sindur spell, at okkurt er komið eitt sindur skeivt fyri í føroyskari pressu í sambandi við loyvisgevingina. Hann vísir á, at fleiri oljufólk hava sett seg í samband við hann og spurt, hvat liggur aftanfyri úttalilsini í føroyskum fjølmiðlum um, at tað skal hava verið ein fyrimunur fyri at fáa loyvi, at eitt føroyskt felag hevur verið partur av bólkinum.

– Tá tað á pressufundinum í Norðurlandahúsinum í farnu viku varð spurt, um involvering av føroyingum í eini komandi oljuvinnu hevði havt nakra ávirkan á loyvisgevingina, tá tað stóð javnt millum feløgini, greiddi eg frá, at tað fyrst og fremst var leitiprogrammið við høvdu hugt eftir, men hitt var eisini eitt kriterium. Víst varð á í sambandi við føroyskt innihald, at tað var tann samlaði pakkin um, hvat man vildi gera fyri mennning, upplæring osfr., sum hevði týdning.

Herálvur Joensen sigur tí, at tá hann hann verður endurgivin fyri at hava sagt, at tað var avgerandi at hava føroysk oljufeløg við, stóð tað á jøvnum millum feløg, so er tað beinleiðis skeivt ella ein misskiljing. -Vit hava alla tíðina sagt, at tað ikki hevði nakran serstakan týdning, og tí vildi tað verið heilt burturvið av okkum, eftir at loyvini eru latin, at sagt, at tað kortini hevði týdning.



*Umboð fyri bæði tey føroysku oljufeløgini vóru við á oljuráðstevnuni í Stavanger. Her eru tað Poul Mohr frá Atlants Kolvetni og Olaf Olsen frá Føroya Kolvetni, sum eru saman við einum øðrum veterani innan vinnulív og kommunalt arbeiði, Dánjal av Rani* **Mynd jan**

vestan fyri Hetland. -Ein útbjóðing stendur fyri framman á bretskum øki, sum tó er vorðin útsett vegna nýggjar umhvørvisligar reglur. Eg ivist ikki í, at tá teirra útbjóðing fer í gongd, so fer eisini hon at hava týdning fyri alt økið her á Atlantsmótinum. Við teimum drúgvu royndunum, sum bretar longu hava gjørt sær á djúpum vatni nær við okkara leiðir, haldi eg, at eitt samstarv kundi verið fruktagott fyri oljuleitingina og vónandi framleiðsluna í okkara øki í framtíðini sigur ein bjartskygdur oljumálaráðharri, sum fegin rættir hondina út til bretar eins og aðrar grannar, sum vilja eitt sínamillum samstarv, har báðir partar hava nakað at vinna.

**Góðan fund**

Bretski orkumálaráðharrin Margareth Lidell heldur seg eisini hava fingið nógv burtur úr fundinum við føroyska starvsbróðurin. -Vit høvdu sera fruktagóðar samráðingar. Bæði bretski oljuídnaðurin og stjórnin eru ovurfegin um úrslitið av fyrstu føroysku útbjóðingini. At síggja ast bretsk oljufeløg nú fáa møguleika at arbeiða í hesum nýggja økinum er eisini sera kærkomið.

Hon ynskir annars føroyingum góða eydnu og um so er, at føroyingar hava brúk fyri hjálp ella ráðgeving av nøkrum slag, so eru bretar til reiðar at geva hana. – Vit hava gjørt nógv mistøk gjøgnum árini og hava lært nógv av teimum. Kunnu vit hjálpa føroyingum við okkara royndum, so vilja vit heldur enn fegnir hjálpa.

Margareth Lidell heldur tí almannakunngerðingina av føroysku útbjóðingini vera góð tíðindi fyri bæði føroyingar, fyri bretsku stjórnina og annars alla oljuverðina.

Bretski oljumálaráðharrin sigur, at tað ikki bert eru bretsk oljufeløg sum operatørar, t.d. BP og Amerada Hess, sum eru fegin um at hava fingið fótafesti í Føroyum. Hon sær eisini, at bretskur ídnaður fær møguleikar at virka í Føroyum við tí úrsliti at hetta kann vera ein, sum hon málber seg á oljumáli, „win to win" støða fyri báðar partar.

Hon sigur annars, at arbeitt verður við at gera 19. útbjóðing á breska landgrunninum klára. Henda er vorðin útsett orsakað av nýggjum umhvørviskrøvum til oljuleiting, sum eru komin í gildi eftir trýst frá Greenpeace. Margareth Lidell sigur, at hóast mangir brunnar eru boraðir vestan fyri Hetland uttan úrlists, so er tað ætlanin hjá stjórnini at halda fram við at bjóða øki út á Atlantsmótinum. Hon dugir ikki at siga, um hetta verður í hesum árinum, men bert, at tað verður skjótast tilber.

Bretski oljumálaráðharrin dylur ikki fyri, at føroyska útbjóðingin verður sera positivt móttikin av bretskum myndugleikum, tí hon gevur eisini vónir til bretska partin av Atlantsmótinum.

# Noreg vantar arbeiðsmegi

Næstformaðurin í stórtingsbólkinum hjá norska Høgraflokkinum heldur, at Noreg eigur at slaka í reglunum um innflytarar fyri á tann hátt at loysa trupulleikarnar hjá arbeiðsmarknaðinum at fáa fatur á arbeiðsmegi.

Á einari ráðstevnu í Oslo um vikuskiftið segði Per Kristian Foss, at verða reglurnar linkaðar, kann norski búskapurin fáa gagn av innflytarunum.

Fleiri kanningar seinastu tíðina hava víst, at norski arbeiðsmarknaðurin fer at hava tørv á fremmandari arbeiðsmegi í komandi árum. M. a. hevur ein kanning avdúkað, at bara kommunurnar fáa brúk fyri 145.000 nýggjum starvsfólkum næstu árini.

Tað er ikki bara í Noregi, at vinnulívið og tað almenna tosa um vantandi arbeiðsmegi í framtíðini. Tað sama er eisini galdandi í Danmark.

## VALUTAKURSIR

| | | 28.08.00 | Ultimo juli |
|---|---|---|---|
| USA | Dollarar | 826,4900 | 806,4000 |
| Bretland | Pund | 1214,6300 | 1208,6200 |
| Týskland | Markur | 381,2500 | 381,2200 |
| Svøríki | Króna | 88,5300 | 87,8000 |
| Noreg | Króna | 92,2800 | 90,8200 |
| Frakland | Frankur | 113,6800 | 113,6700 |
| Belgia | Frankur | 18,4840 | 18,4830 |
| Sveits | Frankur | 482,8800 | 481,7200 |
| Holland | Gyllin | 338,3700 | 338,3400 |
| Italia | Liri | 0,3851 | 0,3851 |
| Finnland | Markur | 125,4100 | 125,4000 |
| Ísland | Króna | 10,3100 | 10,2600 |
| Eysturríki | Skillingur | 54,1890 | 54,1850 |
| Spania | Pesetas | 4,4820 | 4,4810 |
| Portugal | Escudos | 3,7190 | 3,7190 |
| Kanada | Dollari | 556,8400 | 545,0700 |
| Grikkaland | Drakmur | 2,2090 | 2,2100 |
| Japan | Yen | 7,7697 | 7,3727 |
| Írland | Pund | 946,7900 | 946,7200 |
| | Evra | 745,6600 | 745,6000 |

FØROYA SPARIKASSI

Back-up!?
Ein VXA-bandstøð kostar 12.081,- kr. (MVG íroknað). Eitt 170 metrar langt VXA-band rennur 170 m(!), tá ið 66 GB verða pakkaðar á bandið.
Til sammetingar: Eitt DLT-band rennur umleið 20 km. at goyma somu nøgd!
Meiri næstu ferð.
Sp/f GEYMAR
Tel. 22 17 87 • geymar@post.olivant.fo
Hygg eisini á www.ecrix.com
Geymar eiga Hans Eliasar, Herbein og Snorri Fjallsbak.
Sosialurin - 311820